

*Handilin hjá Johannes Lambaa er t.v. á myndini. T.h. er bakaríið hjá Frants*



*Lamba Jóannes (1871-1950) var ein av stóru handilsmonnunum í Havn. Myndirnar av handlum og handilsmonnum í Havn eru úr Havnarbókini hjá Birgar Johannesen*

16 ár tá. Hetta var roknað fyri at vera størsti handil í býnum. Tað var Hans Jakku Jacobsen, sum átti handilin. Har var nógv at fáa. Vit møttu klokkan átta um morgunin. Tað skuldi helst vera til tíðina. So arbeiddu vit til kl. hálvgum átta um kvøldið, og tað var seks dagar um vikuna, leygardag sum aðrar dagar. Tá var einki, sum kallaðist week-end.

Tað var nógv at gera, tí alt skuldi handast yvir disk. Mjøl og melis skuldi koyrast í skuffurnar. Tað var so vigað í pappírsposar, tá fólk keyptu. Tá seldu vit eisini mjólk í fløskum fyri meiaríið.

Margarinkassar við margarin í pakkum skuldu berast inn av lagrinum. Hetta var alt sera tungt. Smæran var ein stór forrætning og brúkti kanska ein kassa av margarini um dagin.

Har var eg í nærum tvey ár. Vit høvdu ikki býsúklu tá, sum onkrir aðrir handlar høvdu, og vit høvdu heldur ongan bil. Vørurnar vóru bornar út til fólk í leypi. Fólk ringdu, og so fingu tey vøruna borna. Men tað vóru eisini smáting, vit bóru út. Tað tyktist ikki at vera nøkur bagatelgrensa. Kanska høvdu fólk hug til at gera sær dælt av hesum. Tað er ein kend søga um kundan sum ringdi til ein handil at biðja ørindadrongin koma við onkrum smátingi. Nei, hetta bar ikki til. Hann var júst farin til Kirkjubø við eini stoppinál!

Eg kom víða um og kendi hvørja abeiðskonu, sum var í býnum.

Tá komið var inn í eini hús var tað arbeiðskonan ein hitti. Tað hevur verið vanligt við arbeiðskonum tá í tíðini hjá teimum, sum vóru væl fyri. Tær høvdu fast frí mikudagar.

Tey sum arbeiddu í Smæruni vóru Hans Jakku og konan, sum var systir Christian Holm Jacobsen, Petur Hans og Helge. So var tað Lena, kona Conrad Joensen, Laura, dóttir Hanus í Rituvík og Marin úr Kvívík. Hon var kend sum pirkan aftaná tað. Aðrar vóru Hedvig, dóttir gamla Knút skómakaran, kona Juul Olsen úti á Reyni og Helena Christiansen, sum giftist við Eliesar Jacobsen, Essaba. Hetta var eitt stak gott arbeiðspláss.

## Fekk sær slaktarí

Men so fekk Hans Jakku sær slaktarí. Hann búði upprunaliga í sethúsunum beint við síðuna av Smæruni. Men so bygdi hann bæði húsini saman og fór uppá í Smæruni at búgva. Síðan gjørdi hann upprunaliga sethúsið til slaktaraforrætning. Hann fekk ein dana at standa fyri henni.

Her var seyður keyptur, einir 7-800 hvørt heyst, sum komu úr Norðradali, av Velbastað og nógv úr Sandoynni eisini. Seyðurin varð flettur, og mítt arbeiði var at skræða vembur. So hetta er nakað sum eg dugi.

Og so var at selja avroðini, tað var eisini mín uppgáva. Sagt var fólki frá, so komu tey eftir teimum. Hetta var eisini forkunnugur og góður døgurðamatur.

Tað var byrjað tíðliga uppá árið at slakta. Tað bar til at fáa feskt kjøt úr Smæruni longu á Ólavsøku, tveir mánaðir áðrenn vanliga fjalltíð, sum var seinast í september og inn í oktober. Upprunaliga var einki frystarí, tí kundi fekst kjøt bert tryggjast við at dríggja slaktið av seyðinum. Men seinni fekk Smæran tó kølirúm og frystarí.

Hans Jakku var ein sera framsíggin maður. Hann hevði eina so flotta forrætning, sum hevði nógv at selja, sum aðrir handlar ikki høvdu. Tey »fínu« fólkini komu niðan har at keypa.

Tað varð eisini selt petroleum. Komu fólk at keypa petroleum var hon pumpað uppí dunkar. Men vit máttu eisini bera petroleum út. Vit høvdu tveir dunkar við okkum, sum vit so bóru út til kundarnar og stoyttu í teirra íløt. Tá mátti ansast væl eftir, at petroleum ikki kom uppá hina vøruna. Tað var ikki lukkuligt, tí tá var tann vøran spilt.

Eg fekk 17 kr. um vikuna. Hetta ljóðar ikki av nógvum, men hetta var besta løn, sum varð givin tá fyri arbeiði sum hetta. Tað hevði eisini týdning, at hetta var ein føst løn.

Tann sum kom aftaná mær var Hasse á Krákusteini, sum er deyður fyri fáum árum síðani.



*Bakaríið í Horni eru húsini við kvistinum. Bakaríið var í kjallaranum og sølubúðin var í miðhæddini. Hetta var ein miðdepil í Havn, har tað eisini var dansur. Húsini eru tikin niður og bygd upp í sama stíli. Her húsast Optikbúðin í dag*

## Sorgarsøgan um Otto

Hans Jakku hevði sent sonin Otto niður at læra til slaktara, so hann kundi taka við handlinum. Vit blivu so uppsagdir. Hans Jakku segði við okkum, at nú vóru vit blivnir so gamlir. Hann helt ikki at vit skuldu fortseta, tí nú skuldi Otto koma upp. Nú skuldi hann eisini hava eina býsúklu, og hann skuldi hava ein yngri drong til at koyra hana.

Tað gekk ikki sum ætlað við Otto. Kríggið kom, og tá slapp eingin heim til Føroyar úr Danmark. Ætlanin var so, at hann skuldi koma, tá ið kríggið var av, men tá hendi tað ólukkuliga, at í sjálvum frælsisrúsinum, eftir at kríggið var av í Danmark 5. mai 1945, varð hann skotin og doyði.

Hans Jakku átti ein annan son, Oskar. Hann fekk barnalammilsi og gjørdist kropsliga brekaður. Hann livdi leingi og er deyður fyri nøkrum árum síðani. Høvdinum bilti einki. Tá ið Esmar Fuglø og teir høvdu hvalabátar, lurtaði hann eftir teimum og kom oman á Kongabrúnna at greiða frá, hvussu tað gekk. Hann var skilagóður og visti »alt«.

So mistu tey eina dóttir eisini. So tey vóru bert tvey eftir. Guðny var gift við Mourits, son Kristian Martin Rubeksen.

Tað vóru nógvir handlar í Havn tá. Eg haldi, at teir vóru einir 55. Havnin var ikki stór. Hon var frá Landavegnum, har Poul Restorff hevði handil og niðan til



*Bakarin Andreas í Horni (1874-1960) var abbabeiggi Johan*

Sjónleikarhúsið og út á Skansan. Tað var ein sovorðin trýkantur. Handlarnir vóru størri og smærri. Heinesen var ein stórur handil. Aðrir vóru Ludvig Poulsen, Frants Restorff, Lamba Jóannes, Karl hjá Vága Heina, Kjøt, Evensen og Jacob Lützen. Lamba Jóannes hevði eisini nógv slakt.

## Fyrstu ferð til skips

Nú byrjaði mítt sjólív seint í 1936. Eg fór fyrst ein túr við Rubekk á Róki. Hetta var við Hjalmar á snurriváð. Við snurriváð var bert fiskað um dagin, so royndin var ikki tann stóra hesa tíðina á árinum.

Árið eftir varð so nógv annað at gera. Mamma vaskaði á Skipafelagnum. Tað skuldi vaskast, áðrenn teir komu til arbeiðis um morgunin. Her var sera ábart. Tá tað var brim, hendi tað meira enn so, at mamma ikki slapp til arbeiðis. Tá var molin stuttur og vardi ikki so nógv móti brimi. Eg plagdi at vera við henni at vaska.

Eg plagdi eisini at skera torv, og slíkt, sum var vanligt mannfólkaarbeiði tá í tíðini.

Men í 1937 fór eg við Hjalmar aftur. Christian Holm reiddi hann út, og Esmar Fuglø, sum var giftur við dóttir hansara Turid, átti hann. Turid doyði annars sama ár av